Vikuskiftis Sosialurin







# Fólk til manningardeildina

Vegna vaksandi virksemi hevur Thor samtakið tørv á einum fólki, sum skal hjálpa til við at skipa logistik og samskifti í sambandi við, at manningarskifti fer fram á skipum okkara.

Eisini skal viðkomandi hjálpa til við at halda skil á certifikatum, og at tey ymisku krøvini viðvíkjandi manningarlógum verða hildin.

Thor hevur í løtuni umleið 20 skip kring allan knøttin, og manningartal á teimum ymsu skipunum liggur úr 4 heilt upp í eini 120. Tá ið henda stóra manning skal flytast til og frá skipinum, er tað nógv, ið tað skal haldast skil á, og hesum vóna vit, at tú kanst hjálpa okkum við.

Manningarnar hjá okkum koma úr nógvum ymsum londum, so sum Føroyum, Danmark, Russlandi, Filipsoyggjunum, Ukraina, Kina og mongum øðrum londum.

**Førleikakrøv:**

- Royndir ella útbúgving innan logistik og/ella manning av skipum er ein fyrimunur.
- Hollan telduførleika.
- Góður málkunnleiki (enskt og skandinaviskt er minstakrav).
- Duga væl við fólki.
- Hava evnini til at hava fleiri bóltar í luftini í senn.
- Duga at samskifta við nógv ymisk fólkasløg.

Starvið verður sett sum skjótast, og løn verður sambært avtalu. Umsóknarfreistin er 15. Juli, og hevur tú tørv á at fáa meiri at vita um starvið, kanst tú venda til Sue Philbrow ella Gunnbjørn Joensen á tlf. 422503 ella á telduposti sue@thor.fo ella gunnbjorn@thor.fo

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum verður at senda til:

**P/F Thor**
Bryggjan 5
FO-420 Hósvík
ella við telduposti til sue@thor.fo

THOR

FO-420 Hósvík · Faroe Islands · Tel +298 422503 · Fax +298 422383 · www.thor.fo · thor@thor.fo



# Hjá okkum fært tú eina lønandi útbúgving

FØROYABANKI

**Byrja tína yrkisleið sum næmingur í Føroya Banka.**

**Sum fyrsti børsskrásetti bankin í Føroyum er Føroya Banki eitt nýmótans arbeiðspláss, ið virkar eftir altjóða virkisháttum.**

**Visión Bankans er at vera leiðandi banki í Føroyum og altjóða at veita kundum útvaldar fíggjartænastur. Missiónin er at gera tað fíggjarliga møguligt hjá kundunum at fullnýta síni evnir og sínar møguleikar. Í Bankanum arbeiða vit eftir hesum virðum: dugnasemi, eldhuga og framsøkni.**

**Vilt tú verða partur av framtíðini hjá Føroya Banka? Vilt tú vera ein av okkum?**

**Umsóknarfreistin er 1. august.**

**Les meira á www.foroya.fo**



**»Tá eg var liðug í skúlanum, søkti eg lærupláss nógvastaðni, men eg valdi Føroya Banka, og tað eri eg glað fyri«**
**– Anita Knudsen**